## DAGSINS MEINING

# Eftirspæl

Í oddagrein leygardagin skrivaðu vit um glantrileik samgongurnar, ið vit hildu vera av í hesum umfari. Men síðsti tingdagur avdúkaði enn ein leik ella kanska heldur eitt eftirspæl. Ein av samgongulimunum, Finnur Helmsdal, vildi tá tað kom til 3. viðgerð av broytingunum í lóggávuni hjá partamanni sínum, Pálli á Reynatúgvu, ikki atkvøða fyri.

Finnur Helmsdal kom eisini við sera hvøssum, men samstundis sera vælgrundaðum atfinningum at lógaruppskotunum. Hann vísti á, at komu broytingarnar gjøgnum tingið, fóru tær at merkja eitt afturstig fyri veikar samfelagsbólkar. Henda støða tingmannsins útloysti eitt satt ódnarveður frá partanni hansara, almannaráðharranum.

Uttan at fara í smálutir, ber tó til at sláa fast, at kjarnan í álopi landsstýrismannsins vóru ikki hans-ara sera sakligu atfinningar. Nei tingmaðurin var sagdur at hava reint privat motiv sum grund fytri sínum atfiningum. Atfinningarnar vóru hevnd fyri, at Finnur Helmsdal ikki varð vorðin landsstýrismaður í almannamálum. Eisini varð brigslað Finni, at hann bert var eykamaður. Tað er so nakað heilt nýtt, at eykamenn ikki hava líka nógv virði sum „vanligir" tingmenn.

Burtursæð frá, at Finnur Helmsdal ivaleyst hevði verið ein sera góður og fakliga væl funderaður landsstýrismaður, við tí innliti, áhuga og royndum hann hevur á tí sosiala økinum, so er hetta langt út. Tað er bæði ósakligt og ódámligt, tá ein landsstýris-maður soleiðis loypir á ein tingmann og brigslar honum heiður og æru frá, tí viðkomandi tingmaður er ósamdur. Tingmenn (eisini eykmenn) eru yvir landsstýrismonnum! Teir eru bert og eiga bert at vera bundnir av síni samvitsku.

Atburður landsstýrismansins avdúkar ein ódámligan hugsunarhátt. Tað er so tað, tað er. Verri er, at hesin atburður samstundis avdúkar, at tað so týdningarmikla orðaskiftið og demokratiskur hugsunarháttur hava trong kor í Tjóðveldisflokkinum. Tað er eisini vert at merkja sær, at Finnur Helmsdal tey árini hann hevur sitið á tingi hevur roynt at fáa sínar egnu at reka ein virðiligan sosialpolitikk og ansa eftir ikki at lata flokkin draga ov langt til høgru av eitt nú fólkaflokkinum.

Tað, sum er enn verri, er, at flokkurin hetta seinasta árið hevur latið seg stýra í alt ov stóran mun av Miðflokkinum. Nakað, sum Finnur ikki hevur kunnað forðað, nú hann ikki hevur havt sæti á tingi. Nú hann kom inn sum eykamaður hevur hann so kortini gjørt vart við síni sjónarmið og kunnu vit so bert gita, hvørjar avleiðingar hetta fer at fáa fyri hansara framtíðar virksemi í flokkinum. Hvussu og ikki, so hava allir flokkar brúk fyri tingmonnum við innliti og royndum í mál sum eitt nú sosialmál og sum tora at standa við sítt. Hetta er eitt øki, sum flokkar við virðing fyri sær sjálvum, ikki eiga at ganga uppá kompromiir við bara fyri at varðveita vald.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sameiningarkorruptión?

**Schandorff Vang**
*Oyrarbakki*



Brynhild Thomsen, journalistur, hevði áhugaverda skriving í Fregnir nr. 14 um korruptión.

*"Tað eru bert 10 ár síðani, at Føroyar sum eindømi í demokratiska heiminum fóru á húsagang. Høvuðsorsøkirnar vóru skitnar politiskar skipanir og mannagongdir…"* og víðari: *"…føroyska samfelagið framvegis er sjúkt og plágað av sóttini."*

Er hetta tað, sum hendir í sameiningarnevndini fyri kommunurnar í Sundalagnum?

Er tað so, at vitan er misnýtt *"…til egnan fyrimuns ella fyrimuns fyri onkur ávís, meðan atlitið til borgararnar sum heild verður gloymt"?*

Er talan um *"rossahandlar og lógarsvans"?*

*"Er politiska skipanin ikki gjøgnumskygd allan vegin, so er lítil ivi um, at korruptión fer fram."* Soleiðis stendur eisini í greinini!

Er talan um lótir?

Er talan um nepotismu og framíhjárættindi? *„Tað er eisini eitt slag av korruptión, og avleiðingarnar fyri samfelagið eru teir somu oyðileggjandi."*

*"Um politikararnir halda, at teir eru valdir bert fyri at røkja áhugamálini hjá sínum floksfeløgum, so er talan púra greitt um korruptión."*

Tveir av høvuðspersónunum í sameiningarmálinum eru garvaðir fólkafloksmenn og sýnast vilja gera alt, sum stendur í teirra makt, fyri at tekkjast ætlanunum hjá fólkaflokslandsstýrinum, og á tann hátt slóða fyri skjótari kommunusameining.

Er tað korruptión?

Er talan um kleptokratar?

*„…tí slíkir stjala frá sínum egna fólki og lata til tey fáu útvaldu."*

*„Samanumtikið hava føroyingar alt at vinna við eirindaleyst at krevja góðan stjórnarsið."*

Kunnu vit ikki krevja tað sama av okkara bygdaráðum?

Hví sýnist tað, sum sameiningarnevndin arbeiðir við duldari dagsskrá?

Er korruptión ein trupulleiki teimum 6 sameiningarkommununum?

- Livst so spyrst!

# Kommunu samanlegging í Sundalagnum

**Sólgerð Andreassen**
*Norðskáli*



Tveir kunnandi fundir hava verið í Eydnuni í samband við kommunusamanlegging. Bæði panel og orðstýrari vóru so hjartaliga samd um, at bygdirnar nú skuldi ganga saman í *katólskt* hjúnalag, sum sagt varð. Tað ber nevniliga ikki til at skiljast.

Fólkið kom á fund fyri at hoyra um fyrimunir og vansar. Men frá panelinum varð sagt, at leggja vit ikki saman nú, so verður tað ongantíð. Eg haldi, at tað er óprofessionelt ikki at velja eitt umboð, sum er ímóti samanlegging, so fólkið fekk eitt breiðari grundarlag at taka støðu út frá.

Tað sær út til, at málið hevur alstóran skund, hví? Skulu fólk ikki hava tíð at umráða seg ella hvussu?

Ein av áhoyrarunum bað um, at fólkið varð kunnað við einum faldara. Hetta var ikki hildið at vera neyðugt. Onkur helt, at tað broytti einki, og at fólk bara kundu møtt til fundirnar. Álvaratos, nú verður so nógv tosað um eldrapolitikk. Men tað er bæði synd og skomm ikki at fáa ein faldara í húsini, so tey, sum vóru ov slitin ella sjúk at koma á fund, og tey, sum vóru burturstødd ella til arbeiðis, eisini vórðu kunnað. Hesi fólk eru líka nógv verd, sum tey, sum møttu á fundinum.

Tað er ov vánaligt at skrumbla eitt so stórt mál ígjøgnum.

Við inngongdina á einari konsentratiónslegu stendur at lesa: **"At gloyma er at endurtaka."** Hetta rann mær í huga, tá ið eg hoyrdi um alt, sum møguleikar vóru fyri at gera, bara vit leggja saman. Tað var sum at loypa aftur í 80ini. Har vóru nevndir tunlar, havnir, ítróttarhallir o.a. Sagt varð, at tað var ov lítið av fólki, sum búsettist her. Neyðugt var at skapa meira virksemi, so fólki kundi støðast.

Løgið, her eru fleiri virki og nógv handilsvirksemi, ein skúli við øllum hentleikum og eitt virkið útróðarlív. Nógv nýggj hús verða bygd, hóast kreppan bara hevur fá ár á baki.

Møguleiki var fyri at útbyggja havnina á Oyri. Eg havi einki ímóti framgongd, men skulu vit hava meira tunga ferðslu til Oyrar, hví verður vegurin so ikki lagdur oman fyri bygdina? Minnist til børnini, tey skulu framvegis eftir sama veg í skúla.

Eisini havnin í Hvalvík kann verða útbygd. Har vóru allir møguleikar opnir, og ein møguleiki var at taka ímóti ferðamannaskipum, so vit kundu fáa fleiri ferðafólk í *"Sunda kommunu"*.

Eitt, sum eg saknaði, og havi saknað, er ein sjónligur umhvørvispolitikkur. Tað varð bara tosað um at hyggja frameftir og at byggja meira. Men enn standa skrímsl og minna okkum á 80ini. Aliringar rekast um alt Sundalagið.

*Framhald á næstu síðu*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Hví er Eiðis kommuna ikki við?

**Niels A. Mortensen**
*stýrisformaður KFS*

Nú royndin at fremja størstu kommunusameining í Føroya søgu er við at koma undir land, er spurningurin um hví Eiðis kommuna ikki er við rættuliga komin í brennidepilin. Hendan fokuseringin er rættuliga óheppin, tí spurninguin hevur ikki verið aktuellur fyri partarnar.

Kommunurnar í Sundalagnum hava samstarvað síðan 1985. Í 2001bleiv lagt upp til at víðka samstarvið til at fevna um fleir málsøki. Ein víðkan av samstarvinum til fleiri málsøki kom at merkja, at sjálvræðið hjá kommununum fór at blíva skert munandi og tí komu kommunurnar til ta niðurstøðu at tær eins væl kundu royna sameining.

Tá Eiðis kommuna ikki hevur verið við í hesi gongdini, er tað heilt natúrligt at hon ikki er við í samráðingunum um sameining.

Eiðis kommuna hevur fyrr verið boðin við í samstarvið, men teir hava ikki tikið av, tí hildu vit ikki at tað var realistiskt at royna at taka Eiðis kommunu við. Eitt samstarv við Eiðis kommunu er Felagsskúlin á Oyrarbakka og hevur hetta stóran týdning fyri øki.

Aðrar kommunur hava vent sær til okkara fyri at fáa innlit í samráðingarleistin og tað hava tær fingið, men Eiðis kommuna hevur als ikki víst málinum ans. Tá aðrar kommunur hava vitað um og víst áhuga fyri kommunusameiningini, er tað løgið at Eiðis kommuna skal vera púra óvitandi.

Eiðis kommuna hevur í løtuni eftir øllum at døma nóg mikið í sær sjálvum og tað respektera vit.

Vit hava havt samband við Eiðis kommunu um samstarv og niðanfyri er eitt yvirlit yvir hvussu tað hevur gingist:

Royndir hava verið gjørdar at fáa Eiðis kommunu við í samstarvið millum kommunurnar í Sundalagnum síðan 1988, tó uttan úrslit. Í november 1994 tekur Eiðis kommuna støðu, har hon ger greitt at teir vilja ikki koma upp í samstarvið, grundgevingin er at teir vilja bíða eftir hvat landsstýrið ger við kommunubygnaðin sum heild.

Landsstýrið hevur onki gjørt við kommunubygnaðin og vit mugu tí ganga út frá at Eiðis kommuna hevur somu støðu enn. Í hvussu so er hevur hon ikki givið til kennar at nakað er broytt.

Eiðis kommuna var boðin at koma við í samstarvið um Røktarheimið í Streymnesi, svarið kom í juni 2000 og var noktandi.

Í 2002 var ein roynd gjørd at fáa ein felags sáttmála um læknahølini á Eiði og við Streymin. Eiðis kommunua kundi ikki góðtaka sáttmálan uttan at hinar kommunurnar gingu við til at læknin altíð skal vera 3 dagar um vikuna á Eiði.

Tá tað ikki eru kommunurnar sum seta læknan er ein slík treyt óviðkomandi, grundað á at tað læknin sum av sínum eintingum avger hvussu viðtalan skal lagast eftir tørvinum.

Hugburðurin yvirhøvur millum politikar í kommunufelagsskapinum er at Eiðis kommuna er altíð vælkomin við, tó undir somu treytum sum hinar kommunurnar.

Ársins Songrødd í Fuglafirði:

# Nomi Háberg Hansen nummar eitt

TÍÐINDASKRIV.

Mentanarhúsið í Fuglafirði varð enn eina ferð karmur um eitt av okkara stóru tónleikatiltøkum um vikuskifti. 4. innleiðandi umfar av Ársins Songrødd 2003 vísti av sonnum, hvussu nógv ókend talent vit hava í Føroyum, og tað varð longu frá byrjan lagt upp til eina harða kapping.

Tað sera góða ljóðumhvørvi og dugnaligi ljóðteknikarin Jóhannes Steingrund gjørdi, at tiltakið sum heild eydnaðist til UG. Aftaná at allir luttakararnir høvdu verið uppi á pallinum og sungið, fóru dómararnir handan hurð, at leggja stigini saman. Langt um leingi komu boðini, at nú varð funnið fram til hvør skuldu víðari í stóru finaluni sum eisini verður í Mentanarhúsinum og er tað tann tann 24. mai. Nomi Háberg Hansen bleiv tann sum fór av stað við flestu stigunum og bleiv sostatt nr. 1. Nr. 2 gjørdist Eydna av Fløtum. Næstseinasta umfar verður tann 10. mai. (tvs. leygarkvøldið) í Badmintonhøllini í Havn.

# Fyrispurningur til Óla Breckmann, fíggjarnevndarformann

**Trygvi F. Guttesen**



Við gleði hoyrdu vit teg alment boða frá, at bygg-ingin av Tekniska Skúlanum í Tórshavn skal byrja í ár. Sigast má, at hesin skúlin hevur víst eitt kinesist tol. Eg minnist tá ið flutt var í leigaðu barakkinar hjá kommununi, og eg minnist eisini troystartalurnar um, at hetta bert var ein fyribils loysn, sum nú kortini hevur vart í næstan 30 ár. Mong eru tey, sum fara at fylgja væl við um títt lyfti fer at halda.

**Hví skal vinnan gjalda?**
Eftir sum tú nú hevur víst positivan áhuga fyri Tekniska Skúlanum í Tórshavn, havi eg ein spurning, sum eisini hevur nakað við umrødda skúla at gera:

Hin 12. november 2002 legði Annlis Bjarkhamar uppskot fyri løgtingið um at broyta lógina um yrkisútbúgvingar, soleiðis at vinnan – lærumeistarin - nú aftur skal gjalda skúlapengar, ella rættari sagt, tað almenna skal hava stuðul frá tí privata, meðan lærlingurin ikki er til arbeiðis, av tí at hon/hann eru í skúla.

Grundgevingin fyri hesum uppskoti er sera løgin, og ljóðar soleiðis :

**"Nú nógv virksemi er í handverksvinnuni metir landstýrið, at henda vinna ikki hevur tørv á stuðli í tann mun, sum talan var um í kreppuárunum".**

**Óskiljandi grundgeving**
Hetta er ein óskiljandi grundgeving. Her er als ikki talan um nakran stuðul, men um pengar til skúlanæmingar, sum ikki fáa SU. Málið snýr seg um skúlapengar til næmingar, sum landsstýrið hevur álagt vinnuni at rinda.

Landstýrið hevur við hesi lóg býtt allar skúlanæmingar í tveir bólkar nevnliga: Næmingar í handverksskúlunum og næmingar í øllum øðrum skúlum. Vinnan skal rinda skúlapengar til tann fyrst nevnda bólkin, meðan tað almenna rindar fyri allar hinar skúlarnar.

Mín spurningur til Fólkaflokkin, Føroya Vinnuflokk og til tín Òla Breckmann er :

1.) Hví tóku tit undir við uppskotinum hjá Annlis Bjarkhamar ?
2.) Hví leggja eyka byrðar á vinnuna ( u.l. kr. 3,875 mió um árið ) sum tú áður hevur verið við til at taka burtur ?
3.) Hví taka tit undir við at allir skúlanamingar skulu ikki vera líka, men heldur býtast í tveir bólkar ?
4.) Var tað ikki júst tín partamaður – løgmaður, sum í Ùtvarp Føroya greiddi frá, at vit eiga at hjálpa og stuðla teim skúlanæmingum, sum al oftast vera verandi í Føroyum ?
5.) Hevur tú ætlanir um at gera nakað við hetta mál í samband við komandi fíggjarætlan ?

*Framhald av síðu 10*

Eingin hevur ábyrgd av at beina teir burtur, tí eingin eigur teir. Er tað nakað, sum ferðafólk leggja til merkis, so er tað dálking.

Eitt tað ríkasta økið í Føroyum, tá ið talan er um smádýr, er í fjøruni við Streymin, sum eftir øllum at døma verður savningarmiðdepil. Hetta er streyminum fyri at takka, tí nógv útskifting er í sjónum. Men tað er kanska ein spurningur um tíð, tá kanningar vísa, at Sundalagið er illa dálkað. Verður hildið á, uttan ein skilagóðan umhvørvispolitikk, kann henda, at vit verða fátækari heldur enn ríkari.

Tað er sjálvsagt neyðugt at nakað av náttúruni hvørvir, tá ið bygt verður. Men aðrastaðni í framkomnum londum, verða krøv sett til kanningar, fyri at vita hvørji árin virksemi hevur á náttúruna. Dentur eigur at verða lagdur á, hvar byggingin ger minst skaða, og at virksemi dálkar sum minst. Eru fólk góð við náttúruna, bíða tey ikki eftir at onnur seta krøv. Nei, tá seta tey sær sjálvum krøv, um tey vilja eftirkomarunum væl. Tað finnast virði, sum ikki kunnu gerast upp í pengum. Latið okkum verja tey, so vit kunnu vísa ferðafólki landið uttan at skammast.

Tað er gott at liva í Sundalagnum, og her er vakurt. Nógvur fuglur er bæði summar og vetur. Ternubøli, tjøldur og æðureiður eru allan vegin suður eftir steymoynni frá brúnni til Streymnesar. Útróðrarbátar koma og fara, og fólk seta nógv tiltøk í verk, sum høvi er at savnast til.

Sum rákið er, verða kommunurnar ivaleyst lagdar saman fyrr ella seinni. Men lat okkum fyrirreika til okkum til ta tíð, og geva fólkinum eina ítøkiliga ætlan. Tað er óheppið, um fólk kenna seg noydd at flyta burtur. Tí kanska valdu tey at búseta seg á einum friðarligum miðstaðarøki.

Eg havi einki ímóti framgongd ella samanlegging, men ikki fyri ein og hvønn prís. Sárini og sviðin frá 80unum plágar framvegis, og eftir fundirnar haldi eg ikki, at vit eru vorðin stórt meira búgvin.

P/S Ein lítil viðmerking til Hans Jørgen Jensen.

Sum øllum kunnugt, sum lesa tíni brøv, ert tú rættiliga ironiskur, tá ið tú skrivar. Tað er ikki vist at øll skilja teg. Tú kundi eisini sagt, at Hvalvíkingar o.o. ikki eru bangin fyri at bróta upp um armar og tískil eiga at verða javnsett. Men onkur er, sum ikki hevur nóg nógv sjálvsálit, tí ynski um at eingin samanlegging verður uttan Sunda kommunu, kom ikki frá Sundakommunu, men frá hinum kommununum.

Tit kundu kravt, at verður atkvøða, og allar hinar kommunurnar eru fyri, so má Sunda kommuna fylgja við. Hetta er ikki meira enn rímiligt í einum demokratiskum samfelag.